## Katrin boykkottar ikki

Útvarp Føroya prátaði í morgun við Katrin Olsen, sum í summar verður fyrsti føroyingurin, sum tekur lut í OL-kapping. Men hóast nógv hevur verið tosað um boykott, so er hetta ikki nakað, sum Katrin hevur tosað um. – Tosið um boykott snýr seg fyrst og fremst um, at politikkarar og onnur møguliga ikki verða við til setanina. Millum ítróttafólk hevur hetta ongantíð verið eitt mál, segði Katrin Olsen við góðan morgun Føroyar.



## Sprint triathlon sunnudagin

Føroya Triathlon Felag skipar sunnudagin fyri Sprint triathlon. Kappingin verður hildin í Havn, og verður kappast í 750 metra svimjing, 20 km súkkling og 5 km renning. Fyrst verður svomið í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja, skal íðkarin skunda sær út á súkkluna, og súkkla frá Svimjihøllini eftir Norðara Ringvegi, fram við Strond til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C.Effersøesgøta/Norðari Ringvegur tríggjar ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins. Her verður skift til renning, og runnið verður frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Teinurin verður runnin seks ferðir.

## B36-NSÍ í morgin

Ein framskundaður dystur í Formula-deildini verður spældur í Gundadali hóskvøldið. Sambært kappingarskipanini skuldu liðini annars spæla í Runavík um vikuskiftið, men NSÍ skal tá spæla um Atlantic Cup steypið móti íslendsku meistarunum. B36 hevur játtað, at teir kunnu spæla í Gundadali hóskvøldið, og verður dysturin spældur klokkan 18. Tað merkir so eisini, at dysturin í Havn millum somu lið, sum eftir skipanini skuldi verið spældur 29. juni, ístaðin verður spældur í Runavík.

**-mørk**

## Ónøgdur Amager-skipari

Andreas Mortensen, sum undan hesum kappingarárinum gjørdist liðformaður hjá Fremad Amager, er ikki nøgdur við útspælið, sum felagið hevur givið honum til nýggjan sáttmála.

Mortensen hevur sáttmála fram til summar, men hóast hann hevur hug at halda fram í felagnum, skulu onnur tøl á borðið, um hetta skal gerast veruleiki.

- Vit eru ikki nøgdir við útspælið frá Fremad Amager. Andreas er fegin um at vera í felagnum, og Amager hevur eisini fremstu raðfestingina hjá okkum. Men teirra útspæl er nakað væl frá tí, sum vit krevja, sigur Lars Ulrich Mortensen, sum er bæði pápi og ráðgevi hjá spælaranum, við danska bold.dk.

**-mørk**

# FM hjá yngru deildunum

**Yngstu badmintonspælararnir avgreiddu um vikuskiftið sínar FM-kappingina**

BADMINTON
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Hjá gentum 11 ella hevur spenningurin verið stórur, eftir at Kristina og Ása áður hava spælt tríggjar sera tættar dystir, og serliga í fyrsta settinum livdi hesin dysturin eisini upp til hetta. Tað eydnaðist tó Kristinu at taka settið 23-21, og so vann hon hampuliga trygt í næsta settinum.

Hjá dreingjum 11 vann Sámal Joensen úr ÍF ein tryggan finalusigurin.

### Havnin og Fuglafjørður

Fyri yngstu bólkarnar er galdandi, at Havnin og Fuglafjørður hava sett seg á tað nógva, og so varð eisini hjá U13. Har fóru øll heiðursmerkini á kvinnusíðuni til HBF, meðan ÍF tók alt á dreingjasíðuni.

Sagt verður, at talan var um eina sera góða kapping, um vikuskiftið. Og eisini tey bæði komandi vikuskiftini eru nógvir dystir á skránni.




*Hjá dreingum 15 eydnaðist Ara Ó. Ellingsgaard at vinna finaludystin móti Andreas Poulsen*

# Kvinnur og oldboys

**Sunnudagin 6.apríl 2008 varð spælt um Føroyameistaraheitið í A-bólkinum og oldboys í badmintonhøllini í Tórshavn**

BADMINTON
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um kapping, har bert kvinnur og oldboys tóku lut. Hjá kvinnunum gjørdist tað Rannvá Carlsson úr HBF, sum vann kappingina framman fyri Biritu og Súsonnu Poulsen úr VÍF. Birita og Súsanna vunnu tó kappingina í tvímansleiki.

Hjá monnum vann Herman Eysturoy einstaklingakappingina, meðan Johannes A. Ellingsgaard og Gunnar Streymoy vunnu tvímansleikin.

Leygardagin komandi verða tað unglingar, sum skulu kappast um FM. Annan hósdag verða innleiðandi umførini í tvímansleiki fyri menn og mixed-double. Fríggjadagin 18. apríl eru innleiðandi umfarið hjá meistarabólkinum, og leygardagin 19. apríl verður so sjálvt finaluumfarið á skránni.

**Badminton-úrslit**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **A-bólkurin** | | | |
| Einmansleikur, kvinnur | | | |
| | 1 | Rannvá Carlsson | HBF |
| | 2 | Birita Poulsen | VIF |
| | 3 | Súsanna Poulsen | VIF |
| Tvímansleikur, kvinnur | | | |
| | 1 | Birita Poulsen & Súsanna Poulsen | VIF |
| | 2 | Helena Lamhauge & Rannvá Carlsson | HBF |
| **Oldboys** | | | |
| Einmansleikur | | | |
| | 1 | Herman Eysturoy | |
| | 2 | Erling Eysturoy | |
| Tvímansleikur | | | |
| | 1 | Johannes A. Ellingsgaard & Gunnar Streymoy | |
| | 2 | Bent á Lava & Herman í Stórustovu | |
| | 3 | Herman Eysturoy & Erling Eysturoy | |

**Badminton-úrslit**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **U11** | | | |
| Gentur | | | |
| | 1 | Kristina Eriks | HBF |
| | 2 | Asa Egilstoft | MBF |
| | 3 | Sólfríð Joense | VIF |
| Dreingir | | | |
| | 1 | Sámal Joensen | IF |
| | 2 | Sigmundur Je | IF |
| | 3 | Andreas Pouls | IF |
| **U13** | | | |
| Gentur | | | |
| | 1 | Rannvá Carls | HBF |
| | 2 | Helena S. Lar | HBF |
| | 3 | Liljan Luid | HBF |
| Dreingir | | | |
| | 1 | Arnold Kristia | IF |
| | 2 | Pól Magnus P | IF |
| | 3 | Rói Dalsá Ols | IF |
| **U15** | | | |
| | 1 | Birita Poulsen | VIF |
| | 2 | Súsanna Pouls | VIF |
| | 3 | Barbara Eystu | HBF |
| Dreingir | | | |
| | 1 | Ari O. Ellings | IF |
| | 2 | Andreas Pouls | HBF |
| | 3 | Ellindur Gaar | HBF |